# Málráðið

## Ársfrágreiðing 2016

# Ársfrágreiðing 2016

## Fororð

Við hesum verður tann fjórða og seinasta ársfrágreiðingin hjá verandi Málráð løgd fram, nú tíðarskeiðið hjá fyrsta Málráðnum, sum varð tilnevnt frá 1.1.2013, rann út 31.12.2016. Seinni varð tó heitt á verandi málráðslimir at verða sitandi, til nýtt Málráð verður valt, væntandi 1. apríl 2017.

Við nýggja Málráðnum fylgdu ymsar broytingar. Føroyska málnevndin við fimm nevndarlimum, sum virkaði frammanundan, var skipað eftir kunngerð, men nýggja Málráðið er skipað sambært løgtingslóg og hevur víðari heimildir, enn Málnevndin hevði. Í Málráðnum sita 11 limir, ið breitt umboða stovnar og felagsskapir, sum á onkran hátt hava málið sum sítt virkisøki. Til at vera millumlið millum skrivstovuna hjá Málráðnum, Málstovuna, og Málráðið velur ráðið eina starvsnevnd, sum hevur regluligar fundir um leið eina ferð um mánaðin. Ráðið hittist í minsta lagi tvær ferðir árliga.

Málráðið byrjaði ikki sítt virksemi á berum, men fann sær trygt dagligt kjølfesti í teirri vælvirkandi skrivstovuni, sum gamla málnevndin longu hevði. Málstovan stendur fyri dagligu máltænastuni, sum ráðgevur og leiðbeinir almenningi í málsligum ivaspurningum og eftir førimuni gongur undan í málsligari menning í samfelagnum. Fyrsta árið varð lýst eftir málfrøðingi at standa fyri arbeiðinum at ritstjórna eina stavsetingarorðabók, og tað arbeiðið er komið væl áleiðis. Sostatt eru tvey fólk í starvi á Málstovuni, skrivari og málfrøðingur. Kortini má samanumtikið ásannast, at fíggarligu karmarnir hjá Málráðnum at virka hava verið treingir og at tað tískil hevur verið trupult at eftirlíka teimum ynskjum, sum natúrliga hava verið um átøk málinum at frama, eitt nú við almennum tiltøkum ella kanningum, og lága játtanin hevur eisini forðað fyri einari skipaðari langtíðarráðlegging.

Ein avbjóðing í nýggja Málráðnum var at finna seg til rættis í nýggja bygnaðinum við 11 limum og eini starvsnevnd við 5 limum, sum hittist oftari. Tað arbeiðið hevur í stóran mun verið skipað soleiðis, at starvsnevndin hevur fyrireikað mál til ráðið at viðgera og avgreiða. Allar meginregluligar avgerðir verða tiknar í ráðnum.

Longu áðrenn Málráðið varð sett, lógu ávís mál og bíðaðu eftir at verða viðgjørd og avgreidd. Eitt teirra var, hvat bókstavarað skal vera í gildi fyri føroyskt. Hóast royndir vórðu gjørdar, fekst ikki einmælt semja um hetta í Málráðnum, men ein meiriluti við 8 ímóti 3 samtykti tó tað bókstavarað, sum síðan er lýst og sum m.a. arbeiðið við stavsetingarorðabókini heldur seg til. Eitt ávíst rumbul stóðst av hesi avgerð. Tað var óheppið, men hetta var eitt mál, sum mátti avgreiðast og sum í síni natúr ikki hevði møguleikar fyri nakrari millumloysn. Ávísar royndir vórðu eisini gjørdar at fáa politisku skipanina at ógilda avgerðina, men hóast málið kom fyri á tingi, datt tað kortini burtur. Tískil royndist sonevnda armslongdarprinsippið, sum frá byrjan varð undirstrikað at galda, at enda eisini at vera galdandi í verki. Við støði í avgerðini um bókstavarað tók Málráðið

eisini avgerð í ávísum ivamálum um stavseting av landanøvnum í sambandi við útgávu av nýggjum atlasi.

Nógvir spurningar troka seg á, tá ið tað snýr seg um støðuna hjá føroyskum og hvussu vit varðveita og styrkja føroyskt kring um í samfelagnum. Víst hevur verið á, hvussu umráðandi tað er, at føroyskt gerst ein sjálvsagdur valmøguleiki í talgilda heiminum, har sum so stórur partur av fólkinum brúkar so stóran part av síni tíð. Tað er at vóna, at okkurt munagott hendir á tí økinum skjótt. Frammi hevur eisini verið at fáa skipað undirvísingartilboð í føroyskum til tilflytarar, soleiðis at tey hava møguleika at finna seg til rættis í føroyska málsamfelagnum. Eyðvitað eigur Mentamálaráðið sín sjálvsagda part av hesi uppgávu, men nógv av hesum er so víðfevnt og viðvíkur samfelagslívinum sum heild, og tí skuldi tað verið sjálvsagt, at øll politiska skipanin sýndi hesum ans og átók sær sín part at fíggja slík alneyðug tiltøk.

Við hesum takkar fyrsta Málráðið fyri seg og ynskir tí komandi hepna hond í arbeiðinum og blíðan byr.

Málráðið, 19. januar 2017

Zakaris Svabo Hansen, formaður

# Innihald


Fororð ........................................................................................ 2
Innihald ........................................................................................ 4
Arbeiðssetningur ........................................................................................ 5
Málráðið ........................................................................................ 6
    Limir í Málráðnum ........................................................................ 6
    Starvsnevnd ........................................................................ 7
    Starvsfólk og umsiting ........................................................................ 7
Fundir í Málráðnum ........................................................................ 8
    Fundir í starvsnevndini ........................................................................ 9
    Samstarv ........................................................................ 10
Avgerð í Málráðnum ........................................................................ 11
Kunning og ráðgeving ........................................................................ 12
    Heimasíðan ........................................................................ 12
    Dømi um nýggj orð í 2016 ........................................................................ 12
    Málslig ráðgeving ........................................................................ 12
    Stavsetingarorðabók ........................................................................ 14
    Málráðið í miðlunum ........................................................................ 15
    Málstovan í kringvarpssendingini *Máltíð* ........................................................................ 15
Hendingar í 2016 ........................................................................ 16
    Móðurmálsdagurin 2016 ........................................................................ 16
    Vælkomurøða hjá formanninum ........................................................................ 17
        Filmskapping *Besti filmur um málið* ........................................................................ 18
        Móðurmálstiltakið *Ung og málið* ........................................................................ 19
    Norðurlendskur mál- og netverksfundur 2016 ........................................................................ 21
    Ársins orð 2016 ........................................................................ 21
Roknskapur fyri 2016 ........................................................................ 22
Málslig ráð ........................................................................ 23

# Arbeiðssetningur

Málráðið hevur sum endamál at røkja, menna og verja føroyska málið, at vegleiða, ráðgeva og gera niðurstøður í málspurningum og at áseta føroyska stavseting. Málráðið skal savna og skráseta nýkomin orð, máliskur, framburðir og onnur málslig fyribrigdi í føroyskum og skal vera til hjálpar at velja og evna til nýggj orð.

Málráðið gevur landsstovnum og almenninginum vegleiðing, ráð og upplýsing um føroyskt í talu og skrift. Almennir myndugleikar eiga í størst møguligan mun at fylgja niðurstøðunum hjá Málráðnum.

Eisini kunnu stovnar og einstaklingar venda sær til Málráðið við spurningum. Málráðið eigur at samstarva við fjølmiðlar, stovnar og almennar myndugleikar, ið hava stóra málsliga ávirkan. Í sambandi við yrkisbólkar skal Málráðið menna gott føroyskt yrkismál og annars skipa fyri átøkum málinum at frama.

Málráðið ritstjórnar og greiðir til útgávu eina føroyska stavsetingarorðabók, sum landsstýrismaðurin løggildir. Almennir myndugleikar hava skyldu at fylgja ásetingunum í stavsetingarorðabókini.

Málráðið er málrøktar- og málmenningarstovnur, skipaður undir landsstýrinum og í virksemi sínum óheftur av politisku skipanini.

# MÁLRÁÐIÐ

## Limir í Málráðnum

Skeiðið hjá ráðnum, sum situr í løtuni, er frá 1. januar 2013 til 31. desember 2016.



**Zakaris Svabo Hansen**, adjunktur, Tórshavn, formaður, valdur eftir tilmæli frá Móðurmálslærarafelag Føroya.



**Katrin Næs**, miðnámsskúlalærari, Hvannasundi, næstforkvinna, vald eftir tilmæli frá landsstýrismanninum.



**Hjalmar P. Petersen**, lektari, Sandavági, valdur eftir tilmæli frá Fróðskaparsetri Føroya.



**Marna Jacobsen**, ritstjóri, Sørvági, vald eftir tilmæli frá Føroya Lærarafelag og Javnstøðunevndini.



**Kári Leivsson**, sálarfrøðingur, Hoyvík, valdur eftir tilmæli frá Rithøvundafelag Føroya.



**Sólvá Jónsdóttir**, ráðgevi, Hósvík, vald eftir tilmæli frá Námi.



**Anfinnur Johansen**, lektari, Hoyvík, valdur eftir tilmæli frá Navnanevndini.



**Hanna Simonsen**, fulltrúi, Tórshavn, vald eftir tilmæli frá Kommunusamskipan Føroya.



**Eivind Weyhe**, fyrrv. lektari, Tórshavn, valdur eftir tilmæli frá Staðarnavnanevndini.



**Randi Meitil**, miðnámsskúlalærari, Tórshavn, vald eftir tilmæli frá Málfelagnum.



**Jonhard Mikkelsen**, námslektari, Vestmanna, valdur eftir tilmæli frá landsstýrismanninum.

## STARVSNEVND

Í starvsnevndini eru hesir málráðslimir: Zakaris Svabo Hansen, formaður, Katrin Næs, næstforkvinna, Marna Jacobsen, Anfinnur Johansen og Jonhard Mikkelsen.

## STARVSFÓLK

Á skrivstovuni hjá Málráðnum, Málstovuni, starvast:



Kristin Marjun Magnussen**,** málfrøðingur,
tlf: (+298) 29 25 22
t-postur: kristin@malrad.fo



Marius Staksberg, skrivari,
tlf: (+298) 31 23 97
t-postur: marius@malrad.fo

## UMSITING

Málstovan er umsiting hjá Málráðnum og veitir fólki og stovnum málsliga vegleiðing. Nógvir fyrispurningar koma inn við telefon, og aðrir verða sendir við t-posti.
Málstovan er at hitta á tlf. 312397 ella við at senda t-post til: malrad@malrad.fo.



*Málráðið 2013-2016 á fyrsta fundi. Her saman við fyrrv. mentamálaráðharra Bjørn Kalsø*

# Fundir í Málráðnum

## Ráðsfundir

Í 2016 hava verið tríggir fundir í Málráðnum. Vanliga eru tveir um árið, men orsakað av sparing í 2015, varð seinni fundurin fluttur til í ár.

Á fundi í Málráðnum varð kunnað um tað, sum fyriferst á Málstovuni, og tað, sum Málráðið hevur við at gera, m.a. arbeiðið við stavsetingarorðabókini og móðurmálshaldinum. Víst varð eisini á, at fyrireikingarnar til móðurmálsdagarnar í framtíðini áttu at farið í gongd nógv fyrr. T.d. varð víst á, at í 2019 eru 200 ár, síðan V. U. Hammershaimb varð føddur, og tá hevði verið frágerða gott høvi at gjørt okkurt serligt burturúr.

Arbeiðið við stavsetingarorðabókini ger tað enn ásýniligt, at stórur tørvur er á dagførdum og skipaðum talgildum tekstasavni til hetta arbeiðið og til málsligt arbeiði yvirhøvur. Tað kundi verið skipað saman við Føroyamálsdeildini á Setrinum. Verandi talgilda tekstasavn er ikki dagført í eini 15 ár og tað er óheppið. Tørvur er m.a. á at síggja upplýsingar um keldur og um tíðarfesting. Gott hevði verið, um ymisk tekstasløg høvdu verið umboðað í ávísum lutfalli, og allir tekstirnir áttu at verið føroyskir; ikki so fáir danskir og enskir tekstir eru í verandi savni og eisin tekstir á øðrum málum. Eisini hevði verið eftirynskjandi, at talumál er umboðað í savninum. Upplýst varð, at talumálskanning fer fram á Føroyamálsdeildini. Trupulleikin er arbeiðsorkan, tí sum er hevur Málstovan ikki orku at arbeiða nógv við tekstasavni, og verandi tekstasavn hoyrir undir Setrið.

Málráðið var samt um at senda Løgtingsskrivstovuni og Løgmansskrivstovuni bræv við áheitan um, at virkað verður fyri kynsuttanveltaðum lógarmáli.

Málráðið sóknaðist eftir kunning um eftirmetingina av virkseminum hjá Málráðnum, sum *Lóður* ger fyri Mentamálaráðið, men einki var at frætta úr Mentamálaráðnum. Mentamálaráðið má fyrst viðgera eftirmetingina, áðrenn tað ber til at kunna Málráðið. Víst varð eisini til á fundi í Málráðnum, at sambært løgtingslóg um Málráð eigur í eftirmetingini m.a. at verða mett um, um Málráðið, Navnanevndin og Staðarnavnanevndin kunnu skipast í somu lóg, men komið varð ikki inn á tann spurningin í samrøðunum, sum starvsfólk hjá *Lóðri* hevði havt við limir í Málráðnum í sambandi við kanningina.

Kjak var um móðurmálsdagin 2017. Tað er nærum ómøguligt at skipa fyri tiltøkum uttan serkøna hjálp uttanífrá, og tílík hjálp er ikki ókeypis. Við teimum fíggjarkørmum, sum Málráðið virkar í, eru tílík tiltøk, m.a. móðurmálsdagurin, treytað av peningaligum stuðli.

Higartil hava móðurmálshaldini í stóran mun vent sær til børn og ung, og eitt nú máltøkni hevur verið á skránni. Uppskot var um at seta *yrkismál* á skrá í 2017, og tað fekk undirtøku. Nøkur yrkisøki vórðu nevnd, t.d. sálarfrøði, smíð og annað handverk, málið hjá

jarðarmøðrum og trolaraorð. Eisini kundi granskingarmál sum heild verið tikið upp. Hetta móðurmálshaldið kundi eisini verið meira ráðstevnukent enn árini frammanundan.

Stavsetingarprinsipp var eisini á skrá. Spurt varð, nær avgerð er tikin um at stava sokallað *arvorð* etymologiskt, men *tøkuorð* fonetiskt. Og hvør orsøkin er til, at vit hava valt tvey ymisk sløg av stavsetingarreglum, og um tað ber til at gera greiðan skilnað millum *arvorð* og *tøkuorð*.

Víst varð á, at etymologiska stavsetingin gongur aftur til stavsetingaruppskotini hjá Hammershaimb, tó við størri og smærri broytingum (t.d. *x* > *ks: laxur* til *laksur*; tveir ø-stavir (*ø*, *ö*) til ein (*ø*)). Ein viss siðvenja hevur kortini verið at stava nýggjari lánorð eftir føroyskum framburði heldur enn eftir stavsetingini í málinum, haðani tey eru lánt; t.d. *trolari* av *trawler* (kundi verið *trawlari*), *gegl* av *gaol*, *bukkvald* av *Buchwaldt*. Semja tóktiskt at vera um, at tað neyvan hevði fingið breiða undirtøku at skift frá verandi etymologisku stavseting til eina ortofona ella ljóðrætta stavseting. Tillagingar tann vegin av verandi stavseting høvdu tó kanska verið møguligar.

Ein spurningur er eisini, í hvønn mun nýggjari lánorð skulu stavast ortofont, og í hvønn mun tey skulu stavast etymologiskt, og skal stavsetingin so grundast á lángevaramálið, vanliga danskt ella enskt, ella eitt upprunaligari málstig, ofta latín ella grikskt. Eisini varð hugtakið ortografisk purisma nevnt, t.e. at fremmandu orðini verða stavað sambært stavsetingarprinsippum og framburði í lántakaramálinum heldur enn lángevaramálinum. Spurningurin um, hvussu vit skulu skilja millum upprunalig føroysk orð ella *arvorð* og lánorð varð eisini reistur. Og um vit eisini skulu skilja millum lánorð ella tøkuorð og fremmandaorð, sum gjørt hevur verið í donskum.

Á fundinum í desember samtykti Málráðið, at stavsetingin av lánorðum við endingini *–tion, -sion, -ssion* skal vera ávikavist *–tión, -sjón* og *-ssión.*

## Fundir í starvsnevndini

Fundirnir í starvsnevndini í 2016 hava verið 10 í tali.

Starvsnevndin arbeiddi víðari við málinum at hava móðurmálsdag, sum vendir sær til ung. Nakrir limir í starvsnevndini vóru við í fyrireikingarbólkinum, ið stóð fyri móðurmálstiltøkunum í 2016. Í fyrireikingarbólkinum vóru harumframt umboð fyri Málstovuna, Mentamálaráðið, Nám, Kringvarp Føroya, Sosialin og Føroya Fólkaháskúla

Tíðliga í árinum viðgjørdi starvsnevndin møguleikan, at Málráðið skipaði fyri onkrum tiltaki umframt móðurmálsdagin. Tí játtaði Málráðið at vera við í tiltakinum "Ársins orð" hjá morgunsendingini í Kringvarpi Føroya. Lurtarar sendu uppskot til KvF, Málráðið gjørdi ein lista við 10 orðum, og eitt pallborð endaði tiltakið 16. desember og valdi *hjúnabandslóg* sum "Ársins orð". Fyri Málráðið luttóku Zakaris S. Hansen, formaður, og Kristin Magnussen, málfrøðingur á Málstovuni.

Starvsnevndin samtykti at senda Løgtingsskrivstovuni og Løgmansskrivstovuni skriv um nýtsluna av kyni í føroyskum lógarmáli. Sum er verður *maður* brúkt uttanveltað í mun til kyn. Eitt nú verður *løgtingsmaður* brúkt um størvini, tá ið tey vísa til mannfólk, men eisini tá ið kynið ikki er kent ella óviðkomandi, meðan *løgtingskvinna* bert verður brúkt, tá ið víst verður til konufólk. Líknandi er galdandi fyri *landsstýrismaður*. Her kundi eitt nú *-fólk* verið brúkt við uttanveltaðari merking.

Starvsnevndin viðgjørdi evnið *føroyskt sum annaðmál*. Vaksandi talið á fólki í Føroyum, sum ikki hava føroyskt sum móðurmál, ger, at ein rættiliga stórur partur av fólkinum hevur brúk fyri at læra føroyskt sum annaðmál. Spurningurin um undirvísing í føroyskum fyri útlendingar hevur verið viðgjørdur í fjølmiðlunum, men tað tykist ikki, sum politiska skipanin tekur spurningin í álvara. Víst varð á, at sum er hava útlendingar, sum flyta til Føroya, rætt til 20 tímar í føroyskum, sum neyvan gevur stórvegis førleika í málinum. Í Noregi er samsvarandi talið minst 600 tímar. Summir kvøldskúlar og onkrar fyritøkur bjóða útlendingum undirvísing í føroyskum, men tað er alt rættiliga tilvildarligt. Semja var um, at neyðugt er at fáa undirvísingina í fasta legu við tilvitaðari námsætlan og realistiskum tímatali, og neyðugt er at útbúgva fólk til uppgávuna. Komið var eisini inn á týdningin av móðurmálsfrálæru, tá ið onnur mál skulu lærast, og týdningin, sum móðurmálið hevur fyri menningina hjá børnum sum heild. Eisini var semja um, at ein tilráðing átti at verið send Mentamálaráðnum.

## Samstarv

Málráðið er í dagligum samstarvi við Føroyamálsdeildina á Fróðskaparsetri Føroya. Málráðið hevur atgongd til innsavnað tilfar í søvnunum á Føroyamálsdeildini; sumt av tí er eisini talgilt.

Málráðið samstarvar við Navnanevnd og Staðarnavnanevnd. Til dømis er tilfar um nevndirnar á heimasíðu Málráðsins www.malrad.fo og eisini listin við góðkendum fólkanøvnum.

Málráðið samstarvar haraftrat við málráðini í hinum Norðurlondunum og er í sambandi við tey, tá ið viðkomandi mál eru á skránni hjá okkum. Umboð fyri øll málráð í Norðurlondum hittast eina ferð árliga á netverksfundi og málfundi. Norðurlendska málsamskipanin (http://sprogkoordinationen.org/aktoerer/centrale-aktoerer/netvaerket-for-sprognaevnene-i-norden/) samskipar samstarvið millum málráðini.

# Avgerð í Málráðnum

## Stavseting av fremmandaorðum við endingunum *–tion, -sion, -ssion*

Málráðið ásetir almennu stavsetingina. Í sambandi við stavseting av fremmandaorðum hevur Málráðið á fundi 7. desember 2016 samtykt, at endingarnar í fremmandaorðum við fyrrnevndu ending verða hesar:

-*tion* verður -*tión* Dømi: *konfirmatión*

-*sion* verður -*sjón* Dømi: *pensjón*

-*ssion* verður -*ssión* Dømi: *missión, aggressión*

# Kunning og ráðgeving frá Málstovuni

## Heimasíðan

Á heimasíðuni hjá Málráðnum, www.malrad.fo, hava í árinum verið ymisk málslig tíðindi og málslig kunning. - Málráðið hevur við heimasíðuni ein pall aftrat at røkka brúkaranum og at samskifta við teir.

## Dømi um nýggj orð í 2016

**drúgstoktur** *l* langtidsstegt (t.d. *drúgstokt lambskjøt*)
**flatbrunnur** *k* plansilo
**greiningarkunning** *kv* (teld) analytics
**heiltakin** *l* heldækkende (um træverju)
**hópfígging** *kv* (búsk) crowdfunding
**knæhundur** *k* (djfr) skødehund, lapdog (sv. *knähund*)
**nándkort** *h* kontaktløst kort, proximity card, contactless card
**svøvnkøva** *kv* (lækn) søvnapnø, obstructive sleep apnea, stytt *OSA*
**sjúkuelvari** *k* (lækn) pathogenic agent
**talugerð** *kv* (málfr) speech act, talehandling
**tráfylging** *kv* stalking
**tráfylgja** *s* stalk
**tráfylgjari** *k* stalker
**trælíki** *h* kunsttræ
**vetraræl** *h* (veðurfr) wintry shower, vinterlig byge
**vørtuverja** *kv* ammebrik, pattebrik, nipple shield
**yrkisgerð** *kv professionalisering*

## Málslig ráðgeving

Partur av virkseminum hjá Málráðnum er málsliga ráðgevingin. Ráðgevingin fer lutvíst fram á heimasíðuni við m.a. orðalistum og málsligum ráðum, og lutvíst við at fólk venda sær til Málstovuna við spurningum. Fram til um 2000 vóru mest sum allir spurningar um telefon, men seinnu árini hevur stórur partur av spurningunum verið um teldupost. Í 2016 vóru spurningarnir til samans 317, av teimum vóru 163 telduspurningar; hvør skrásettur spurningur kann tó innihalda fleiri einstakar spurningar. 2016 er fyrsta árið, at talið á telduspurningum er størri enn talið á telefonspurningum.

Í 2016 snúðu 18% av spurningunum seg um stavseting, 22% snúðu seg um mállæru, 10% um málbering, 33% um týðingar til føroyskt og 18% um annað. Annað fatar m.a. um spurningar um fólka- og staðarnøvn, orðauppruna, ljóðlæru og týðingar úr føroyskum í onnur mál.




Í 2016 vóru 58% av týðingunum til føroyskt úr donskum, 36% úr enskum og 6% úr øðrum málum. Týðingar til føroyskt kunnu snúgva seg um setningar, um einstøk orð, m.a. føroysk avloysaraorð fyri útlendsk, og við hvørt um smáar orðalistar.



Fyrsta árið, talið á telduspurningum varð uppgjørt, var í 2000, tá ið um 7% av spurningunum vóru telduspurningar. Í 2016 komu 51,4% av spurningum um teldupost, og tað er fyrstu ferð, at meira enn helvtin av spurningunum eru telduspurningar.




Úrslit burtur úr týðingum til føroyskt síggjast m.a. aftur sum uppskot um føroysk orð fyri útlendsk orð og eru at finna á heimasíðuni hjá Málráðnum: [www.malrad.fo](http://www.malrad.fo).

## Stavsetingarorðabók

Arbeiðið við Stavsetingarorðabókini er komið væl áleiðis. Við árslok eru uml. 8.000 av 65.000 leitorðum eftir at leggja inn í skipanina. Seinasti stavurin, bókstavurin *s*, verður nú lagdur inn í forritið. Tilfarið verður viðgjørt í fylgibólki og ritstjórnað.

Eftir umsókn játtaði Orðabókagrunnurin 85.000 kr. til arbeiðið við stavsetingarorðabókini. Játtanin kom veruliga væl við og gongd kom í arbeiðið. Peningurin er lutvíst nýttur til at løna studenti parttíð at leggja leitorð inn í skipanina og lutvíst til arbeiðið í fylgibólkinum.

Í 2016 minkaði talið á limum í fylgibólkin úr fýra niður í tríggjar limir, tá ein limur segði seg úr bólkinum orsakað av persónligum ávum.

## Málráðið í miðlunum

Í sambandi við talgildu filmskappingina *Besti filmur um málið* og móðurmálstiltakið á Háskúlanum í Havn *Ung og málið* vóru umboðini, Alda Egilstrøð Magnussen, samskipari, og Kristin Magnussen, málfrøðingur, frá Málráðnum í Kringvarpi Føroya í heyst og kunnaðu um tiltøkini í sendingunum *Góðan morgun, Føroyar* og í *Vikuskiftissendingini*.

Í sambandi við tiltakið *ársins orð* vóru Zakaris S. Hansen, formaður, og Kristin Magnussen, málfrøðingur, í útvarpssamrøðum um tiltakið og við í nevndini, sum valdi ársins orð. Tað fór fram í sendingini *Góðan morgun, Føroyar* í Kringvarpi Føroya 16. desember.

Til høvið at kunna um tiltøkini hjá Málráðnum, *Besti filmur um málið* og *Ung og málið*, stovnaði Málráðið facebook-síðu, so betur bar til at røkka øllum málbólkum. Facebook-síðan hjá Málráðnum er bert ætlað at nýta sum kunningarsíða, tá t.d. skipað verður fyri tiltøkum. Vilja fólk koma í samband við Málráðið ella Málstovuna er framvegis at skriva ella ringja til okkara ella nýta heimasíðuna.

## *Málstovan í kringvarpssendingini* Máltíð

Veturin 2015-16 hevði Solby Christiansdóttir átta sendingar um føroyskt mál í útvarpinum hjá KvF við heitinum *Máltíð*.

16. og 23. februar 2016 hevði *Máltíð* burturav sjóneykuna á Málráðið og Málstovuna.

Í fyrru sendingini hevði Solby Christiansdóttir samrøður við formannin, Zakaris S. Hansen, og næstforkvinnuna í Málráðnum, Katrina Næs. Sendingin snúði seg serliga um stovnin Málráðið og uppgávurnar, sum tað hevur.

Í seinnu sendingini vitjaði KvF starvsfólkini á Málstovuni, Marius Staksberg og Kristina Magnussen. *Máltíð* lýsti arbeiðið og dagligu uppgávurnar á Málstovuni.

# Hendingar í 2016

## Móðurmálsdagurin 2016

Á fundi í Málráðnum varð mælt til at skipa fyri einum móðurmálsdegi, sum skuldi venda sær til børn og ung í øllum landinum.

Í fyrireikingarbólkinum vóru umboð fyri Málráðið, Føroya Fólkaháskúla, Nám, Mentamálaráðið og Kringvarp Føroya.

Fyrireikingarbólkurin var samdur um, at eingin móðurmálsvirðisløn skuldi latast í ár. Í staðin skuldi Málráðið skipa fyri eini filmskapping fyri ung og seta eina peningaupphædd av til vinningar í hesi filmskapping. Til hjálpar við filmskappingini var Pætur Marjunarson Dahl frá Klippfiski.

Móðurmálsdagurin hevur verið hildin á føðingardegi V. U. Hammershaimbs, hin 25. mars. Í ár var 25. mars langafríggjadag. Tí skeyt fyrireikingarbólkurin upp, at eitt minni tiltak skuldi verða vikuna eftir, meðan eitt størri tiltak skuldi verða um heystið.

Hin 31. mars var eitt móðurmálstiltak í Nýggjustovu í Havn, har matstovan *Barbara* bjóðaði okkurt leskiligt til góman og ein trio við Biritu Adelu Davidsen og Sissal G. Magnussen, sangi, og Hans Paula Tórgarð á gittara undirhelt við sangum eftir Hans Andr. Djurhuus. Ásannandi at tey ungu hava tikið filmsmiðilin - nýggja miðilin í Føroyum - til sín, var heitið á tiltakinum *filmur og føroyska málið*. Zakaris S. Hansen, formaður í Málráðnum, beyð vælkomið. Rigmor Dam, landsstýriskvinna í mentamálum, helt røðu, og Pætur Marjunarson Dahl hevði framløgu um málið í føroyskum filmum. At enda var ein sofasamrøða, ið viðgjørdi film og mál og hvussu arbeitt verður við málsligu síðuni í einum komandi filmi. Birgir Kruse tosaði við Sakaris Stórá, filmsleikstjóra, og Marjuna Syderbø Kjelnæs, rithøvund, um teirra filmsverkætlan, og hvussu arbeitt verður við føroyska málinum í huga.

Mentamálaráðið og matstovan *Barbara* stuðlaðu tiltakinum í Nýggjustovu.

## *Vælkomurøðan hjá formanninum í Málráðnum, Zakarisi S. Hansen, í Nýggjustovu 31. mars 2016*



*Formaðurin heldur røðu á móðurmálstiltakinum í Nýggjustovu í Havn 31. mars. 2016*

Kæra landsstýriskvinna, góða samkoma.

Vegna fyrireikarararnar er tað mær ein heiður at bjóða øllum vælkomnum til móðurmálshald her í hugnaligu Nýggjustovu hetta síðsta hóskvøld í marsmánaði.

At halda móðurmálsdag er nú vorðið eitt afturvendandi tiltak, og dagurin hevur undanfarnu ferðir verið hildin 25. mars, á føðingardegi V.U. Hammershaimbs. Í ár fall 25. mars tó á langafríggjadag, og tí samdist fyrireikingarnevndin um, at dagurin í staðin skuldi haldast sum skjótast eftir tað.

Vit hava seinastu árini livað, og vit liva framvegis í eini kollveltandi tíð við stórum avbjóðingum á talgilda og samskiftisliga økinum, gamlir mentanarpallar verða skiftir út við nýggjar, sum seta onnur krøv. Tað hevur við sær stórar avbjóðingar fyri føroyskt mál.

Tað er ein sannroynd, at stórur partur av uppvaksandi ættarliðnum brúkar nógv av síni tíð á netinum ella á onkrum elektroniskum miðli umvegis fartelefon, teldil og teldu, og eins stór sannroynd er tað, at størsti partur av hesum fer fram á fremmandum máli, einamest enskum. Tí er tað altavgerandi fyri framtíðina hjá føroyskum, at føroyskt gerst ein sjónligur valmøguleiki og stendur fólki í boði á hesum nýggju pallum, ikki sum einasta tilboð, tí tað er vónleyst (og neyvan eftirynskjandi heldur), men føroyskt má standa í boði og ikki vera so fráverandi, sum tað er í løtuni.

Tað er umráðandi, at vit málsliga hava ein føroyskan spegil at kenna okkum aftur í og menna okkum út frá. Mín staðiliga áheitan er tí, at vit øll, tað almenna og stovnar og privatar fyritøkur og vit sum einstaklingar, at vit øll standa saman um at útvega okkum føroysk talgild tilboð, tað veri seg spøl, læruforrit o.a., tí ein hin størsta málsliga uppgávan í løtuni er júst at vinna føroyskum pláss á talgildum miðlum, har ið børnini og tey ungu brúka so stóran part av síni tíð og leggja sína orku málsliga. Tað er alneyðugt fyri at føroyskt skal eiga framtíð fyri sær.

Vit hava heilt einfalt ikki ráð at missa móðurmálið, okkara hjartamál, tí so missa vit sambandið við okkum sjálv. Málið er kjarnin í tí, sum vit eru sum einstaklingar, sama hvar í heiminum vit vaksa upp. Og tað er eisini við málinum, at vit skapa felagsskapin.

Hetta snýr seg ikki um avbyrging ella ikki at vilja vita av øðrum, tí vit skulu sanniliga eisini hava atgongd til tað fremmanda og kenna tað, men tað eigur at kunna gerast við góðum kjølfesti í okkara egna máli og okkara egnu mentan.

Hesa ferð hava vit valt "ung og málið" at vera evni á móðurmálsdegnum. Eitt væl umtókt øki millum ung í dag er føroyskur filmur. Støðan hjá málinum verður knýtt at hesum miðli, og heitið fyri tiltakið her í Nýggjustovu í kvøld er føroyskur filmur og málið. Tað verður lýst við framløgu og samrøðu við fólk, sum eru knýtt at filmsgerð. Ætlanin er tó seinni í heyst at skipa fyri einum størri tiltaki, sum tekur fram fleiri aðrar tættir, sum viðvíkja ungum og málinum.

*Zakaris Svabo Hansen*

## Filmskapping *Besti filmur um málið*

Í 2016 beyð Málráðið øllum ungum í aldrinum 14-20 ár til eina talgilda filmskapping. Inn komu 14 filmar. Dómsnevndin metti 8 teirra lúka treytirnar.

Vinningin á 10.000 krónur vann filmurin "Orðið".

Dómsnevndin segði m.a. í grundgeving síni: "Dómsnevndin hevur valt ein film, sum hon metir á fullgóðan hátt uppfyllir tær tríggjar treytirnar, ið settar vóru av Málráðnum: uppfinnsemi, originalitet og málsligt medvit.(...) Eitt sera gott og sterkt hugskot, ið snýr seg um alstóra týdningin av málinum. Uppgávan er loyst seriøst og kreativt, og einki er gjørt av tilvild. (...) Málsliga medvitið er eyðsýnt."



Dómsnevndina mannaðu Dávur Djurhuus, filmsstjóri, Ann Ellefsen, lærugreinaráðgevi í føroyskum á Námi, og Síf Gunnarsdóttir, stjóri í Norðurlandahúsinum.

Tey, ið høvdu gjørt vinnandi filmin, vóru Sissal Matras, Janni Petersen, Sissal Magnussen, Sissal Ellefsdóttir, Rakul Højgaard Poulsen, Bára Joensen og Ásla Olsen. Tey ungu, sum høvdu gjørt filmin "Orðið", eru øll úr 1. s. á Glasi í Hoydølum.

Á móðurmálstiltakinum á Háskúlanum leygardagin 1. oktober valdu áskoðararnir eisini tann filmin, sum teimum dámdi best í úrvalinum, sum dómsnevndin hevði gjørt. Áskoðaravirðisløninina á 2.000 krónur vann Heidi Wolles Ljósheim við filminum "At miða eftir málinum".

Málráðið takkar hjartaliga øllum, sum sendu inn, fyri teirra íkast til kappingina og fyri, at so væl varð tikið undir við tiltakinum.

## Móðurmálstiltakið *Ung og málið*

Í longri tíð arbeiddi fyrireikingarbólkurin og Málstovan við móðurmálstiltakinum *Ung og málið*, ið varð sett at verða á Háskúlanum hin 1. oktober, kl. 13-17. Orka er ikki á Málstovuni at taka sær av so umfatandi tiltaki. Starvsnevndin gjørdi av at seta samskipara og kunningarfólk parttíð at arbeiða við tiltakinum. Sett varð Alda Egilstrøð Magnussen, lesandi.




*Plakat frá tiltakinum (Alda E. Magnussen)*

Tiltakið á Háskúlanum byrjaði kl. 13. Annfinnur Heinesen, stjóri á Føroya Fólkaháskúla, beyð vælkomið. Fyrst á skránni var tónleikur. Bólkurin *Hamradun* legði fyri við einum braki. Kristin Magnussen, málfrøðingur á Málstovuni, heilsaði vegna Málráðið og fyrireikingarbólkin. Tríggjar lesandi á Setrinum høvdu framløgur um málið hjá børnum og ungum. Olga Helmsdal, lesandi á Føroyamálsdeildini, hevði framløguna “Føroyskt-enskt kotuskifti hjá tannáringum.” Rakul Skaale Andreasen, lesandi á Føroyamálsdeildini, hevði framløguna “Hugburður um egna dialekt.” Og Anna Marjun Hentze, lesandi á Námsvísindadeildini, hevði framløgu um “Orðfeingi hjá næmingum í 1. flokki.” Trygvi Danielsen las upp egnar yrkingar, og Anna Poulsen frá ungdómssendingini Røddin í KvF hevði samrøðusalong við Trygva Danielsen og Peturi Pólssoni um teirra arbeiði við føroyska málinum. Úrvalið av innsendu filmunum, ið dómsnevndin hevði valt út, varð víst í høllini fyri steðgin. Tey, ið møttu til tiltakið, fingu eina atkvøðu til at velja tann filmin, ið tey mettu skuldi hava áskoðaravirðislønina. Háskúlin skipaði fyri kaffisølu og orðakviss. Martin Næs, deildarstjóri í Mentamálaráðnum, helt røðu og handaði vinnarunum í filmskappingini *Besti filmur um málið* virðislønina á 10.000 krónur og handaði vinnaranum av áskoðaravirðislønini vinningin á 2.000 krónur. Annfinnur Heinesen takkaði fyri og tónleikabólkurin *AVE* endaði tiltakið á Háskúlanum.

Eini 80 fólk vóru møtt til ein góðan dag á Háskúlanum. Næmingar og lærarar á Háskúlanum gjørdu sítt til, at tiltakið eydnaðist so væl.

Mentamálaráðið og Mentamáladeild Tórshavnar kommunu stuðlaðu tiltakinum.

## Norðurlendskur mál- og netverksfundur 2016

Norðurlendski netverksfundurin varð hildin 31. August, og norðurlendski málfundurin var hildin dagarnar 1.-2. september í Vaasa í Finnlandi. Úr Føroyum luttóku Zakaris S. Hansen, formaður, og Marius Staksberg, skrivari.

Evnið á málfundinum í ár var fleirmælta samfelagið (*ett flerspråkigt samhälle*).

Ein broyting í samstarvinum er, at í framtíðini verður netverksfundur hildin annaðhvørt ár og málfundur annaðhvørt ár í staðin fyri sum higartil, tá ið báðir fundir hava verið hildnir hvørt ár. Broytingarnar eru neyðugar, tí fíggjarkarmarnir gerast trengri. Í 2017 er tó hvørki netverks- ella málfundur, men í staðin er ætlanin, at norðurlendsku málnevndirnar skulu taka lut í norðurlendskari mál- og mentanarstevnu í Århus í døgunum 18.-22. september, sum Málsamskipanin skipar fyri. Netverksfundurin verður í Århus í 2017, tí at Århus er valdur sum *evropeiskur mentanarhøvuðstaður 2017*.

Komandi málfundur verður í 2018 og hesa ferð í Føroyum. Evnið á málfundinum í Føroyum verður málið í sosialu miðlunum. Í 2019 verður netverksfundur í Grønlandi, í 2020 málfundur í Noregi og í 2021 netverksfundur í Íslandi.

## Ársins orð 2016

*Ársins orð 2016* er *hjúnabandslóg*.

Í heyst heitti Kringvarp Føroya á Málráðið at vera við í nýggjum tiltaki, ið tey kalla *ársins orð*. Seinnu árini hevur verið vanligt í londum uttan um okkum at kjósa ársins orð. Á fundi í Málráðnum varð samtykt, at Málráðið skuldi játta at vera við.

Leisturin er, at lurtarar senda uppskot inn. Málráðið/Málstovan fær til uppgávu at gera eitt úrval við 10 orðum burtur úr teimum innkomnu uppskotunum. Síðan velur eitt pallborð mannað við tveimum fólkum umboðandi Málráðið/Málstovuna og einum fólki umboðandi felagið Føroysk Tíðindafólk *ársins orð* í sendingini *Góðan morgun, Føroyar*.

Í heyst heitti morgunsendingin *Góðan morgun, Føroyar* á lurtarar at senda inn uppskot um ársins orð, sum tey mettu høvdu sermerkt árið 2016. Nógv lurtarauppskot komu inn. Málstovan gjørdi eitt úrval við 10 orðum at velja *ársins orð* burturúr: *borgarstjóri*, *ferðafólk*, *fiskivinnunýskipan*, *flóttafólk*, *føðideild*, *gagnnýta*, *hjúnabandslóg*, *sheep view*, *stórmeistari* og *tráfylging*. Burtur úr hesum lista valdi pallborðið orðið *hjúnabandslóg* sum ársins orð.

Pallborðsluttakararnir í morgunsendingini *Góðan morgun, Føroyar* 16. desember vóru Zakaris Svabo Hansen, formaður í Málráðnum, Kristin Magnussen, málfrøðingur á Málráðnum, og Jón Brian Hvidtfeldt, formaður í felagnum Føroyskum Miðlafólkum.

# Roknskapur 2016

## Inntøkur

| | 2016 |
|---|---|
| Játtan | 1.070.000 |
| Stuðul | 84.000 |
| Munur | 5.385 |
| **Til samans** | **1.159.385** |

## Útreiðslur

| | |
|---|---|
| Lønir v.m. | 1.057.516 |
| Keyp av vørum og tænastum | 39.559 |
| Keyp av útbúnaði | 222 |
| Leiga | 50.088 |
| Virðislønir | 12.000 |
| **Til samans** | **1.159.385** |

# Málslig ráð

## Nær eitur tað í samband við og nær í sambandi við?

Tá ið *í* stýrir hvønnfalli, eitur tað *í samband við...*, og tá ið *í* stýrir hvørjumfalli, eitur tað *í sambandi við...*, t.d.:
*Setið tygum í samband við Apotekið.* (hvønnfall)
*Skipað verður fyri upplýsing í sambandi við ætlaðu broytingarnar.* (hvørjumfall)
Eru vit í iva, kunnu vit spyrja *Í hvat samband...* ella *Í hvørjum sambandi...* Er tað natúrligt at spyrja *Í hvat samband...*, hava vit hvønnfall, og er natúrligt at spyrja *Í hvørjum sambandi...*, hava vit hvørjumfall, t.d.:
*Í hvat samband skal eg seta meg?*
*Í samband við Apotekið.*
*Í hvørjum sambandi verður skipað fyri upplýsing?*
*Í sambandi við ætlaðu broytingarnar.*

## Eigur tað at vera *101 strúkarar* ella *101 strúkari*? Hvussu eru hasar reglurnar?

Tá ið seinasta talið, vit siga, er *1*, er navnorðið í eintali, annars í fleirtali.
Grundgevingin plagar at vera, at vit leggja eitt orð burturúr, t.d. *Túsund* [*nætur*] *og ein nátt*, *Hundrað* [*strúkarar*] *og ein strúkari*. Men tað er eisini í samsvari við málkensluna og er tað, fólk vanliga siga. Tað er ikki, fyrr enn vit fara at hugsa um tað – hugsa logiskt, at vit fara at ivast og hava hug at brúka fleirtal, t.d. *101 strúkarar*, tí talan er um fleiri strúkarar. Sum nevnt er tað tað seinasta talið, vit siga, sum ger av, um navnorðið er í eintali ella fleirtali. Tað eitur sostatt *ein og fjøruti bøkur*, men *fjøruti og ein bók*. Og talið *2,5 mió.* kunnu vit siga: *tvær komma fimm milliónir* ella *tvær og ein hálv millión*.

## Hvussu kunnu vit vita, nær *dóttir* eigur at enda við *-ir* og nær við *-ur*?

Tað endar við *-ir* í hvørfalli og *-ur* í hinum føllunum. Bera vit saman við *kona*, endar *dóttir* við *-ir*, tá ið vit kunnu seta *kona* inn í staðin, men við *-ur*, tá ið vit kunnu seta *konu* í staðin, t.d. *<u>Dóttir</u> hansara segði tað* / *<u>Kona</u> hansara segði tað*, *Eg segði tað við <u>dóttur</u> hansara* / *Eg segði tað við <u>konu</u> hansara*.
Kvennkynsorðini *systir*, *móðir*, *mostir* og *fastir* bendast eins og *dóttir* í eintali. Og kallkynsorðið *bróðir* bendist eisini sum *dóttir* í óbundnum eintali.